SJÚKRAHÚS VERKIÐ

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Avtala um samstarv millum

# Fróðskaparsetur Føroya

# og

# Sjúkrahúsverkið

Tórshavn, tann ...26/6 -24

# Indhold


1. Partar ... 3
2. Endamál ... 3
3. Skipan og ábyrgd ... 3
4. Stýrisbólkur ... 4
5. Granskingarsamstarv ... 4
6. Útbúgving og undirvísing ... 5
7. Ph.d. útbúgving ... 5
8. Vitanardeiling og -miðling ... 6
9. Ekstern fígging ... 6
10. Styrkja karmarnar kring heilsugransking ... 6
11. Dáta ... 7
12. Tíðarskeið og uppsøgn ... 7
13. Undirskriving og heildin av avtaluni ... 7

Fylgiskjøl ... 9

Fylgiskjal 1. Strategi fyri heilsugransking ... 9

Fylgiskjal 2. Læknavísindalig grundútbúgving í Føroyum ... 9

Fylgiskjal 3. APN-útbúgving ... 9

Fylgiskjal 4. Aðrar heilsuútbúgvingar ... 10

## 1. Partar

Fróðskaparsetur Føroya (Setrið)

J.C. Svabos gøta 14

FO-100 Tórshavn

og

Sjúkrahúsverkið

J.C. Svabosgøta 41-49

FO-100 Tórshavn

## 2. Endamál

Endamálið við avtaluni er at menna heilsuvísindaliga gransking og útbúgving í Føroyum. Harumframt er endamálið at økja um góðskuna og evidensin í tilboðum um heilsufremjan, fyribyrging, diagnostik, viðgerð, røkt og endurvenjing til gagns fyri sjúklingar í heilsuverkinum.

Við einari avtalu um samstarv, kunnu Setrið og Sjúkrahúsverkið formliga samstarva um heilsugransking, víðariútbúgving og undirvísing. Ein avtala um samstarv styrkir bæði Sjúkrahúsverkið og Setrið í mun til heilsugransking, undirvísing og útbúgving.

Eisini er endamálið at tryggja best møgulig útbúgvingartilboð til lesandi á Setrinum innanfyri heilsufakligar útbúgvingar, alt eftir hvør tørvurin í samfelagnum er.

Gransking, útbúgving og klinikk/praksis hanga óloysandi saman, og eru hesi trý økini tilsamans grundarlagið undir varandi menning av einum munadyggum og granskingargrundaðum heilsuverki á høgum altjóða støði.

Avtalan skal skipa samstarvið millum Sjúkrahúsverkið og Setrið við greiðum ásetingum, tá tað kemur til innihald og mannagongdir og verða karmur um víðari menning av samstarvinum.

Tað er felags ábyrgd hjá pørtunum at tryggja góðar karmar fyri gransking og útbúgving, og eitt týðandi endamál við samstarvsavtaluni er at seta upp felags mál, sum partarnir skulu leggja dent á í royndunum at tryggja starvsfólkunum og teimum lesandi í praktikk so góðar karmar á økinum sum møguligt.

## 3. Skipan og ábyrgd

Rektarin á Setrinum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av heilsuvísindaligu granskingini á Setrinum.

Undir rektaranum á Setrinum er tað dekanurin á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarfrøðivísindi, ið hevur ábyrgd av heilsuvísindaligu granskingini á Setrinum.

Forstjórin í Sjúkrahúsverkinum hevur yvirskipaða ábyrgd av heilsuvísindaligu granskingini í Sjúkrahúsverkinum.

Nýggja Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum, sum varð sett á stovn 1. januar 2023, savnar heilsugranskingina, sum higartil hevur verið á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverkinum, Ílegusavninum og Fólkaheilsuráðnum, í eina eind í Sjúkrahúsverkinum.

Undir forstjóranum í Sjúkrahúsverkinum, er tað leiðarin á Heilsugranskingareindini, ið hevur ábyrgd av heilsuvísindaligu granskingini í Sjúkrahúsverkinum.

## 4. Stýrisbólkur

Forstjórin í Sjúkrahúsverkinum, saman við leiðaranum á Heilsugranskingareindini í Sjúkrahúsverkinum og rektarin á Setrinum, saman við dekaninum á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi møtast tvær ferðir árliga, til at gera støðuna upp viðvíkjandi samstarvinum og meta um tørvin á dagføringum av avtaluni, tilhoyrandi fylgiskjølum og møguligum ískoytisavtalum.

Til hesar fundir verður dentur lagdur á samstarv um heilsugransking og útbúgving.

Fundir verða avtalaðir á hvørjum fundi 12 mánaðir fram. Um tørvur er á tí, kann hvør parturin biðja um fund við 14 daga varningi.

Um ikki annað verður avtalað, skiftast Sjúkrahúsverkið og Setrið at skipa fyri fundunum. Hvør parturin avger sjálvur, hvussu nógv fólk møta vegna partin, undir hesum, hvørji fólk frá fyrisiting, deplum v.m. luttaka á fundunum. Tann parturin, ið skipar fyri fundinum, virkar samstundis sum skrivari á fundinum.

## 5. Granskingarsamstarv

Sjúkrahúsverkið og Setrið hava eina langa siðvenju í samstarvi um heilsugransking. Partarnir eru samdir um at víðariføra og menna hetta samstarvið.

Heilsugranskingin á Setrinum og í Sjúkrahúsverkinum verður løgd soleiðis til rættis, at ein samvirkan fæst millum heilsugranskingina á Setrinum og heilsugranskingina í Sjúkrahúsverkinum.

Dekanurin á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi á Setrinum og leiðarin fyri Heilsugranskingareindini í Sjúkrahúsverkinum eru meginsamskiftisfelagar tá tað kemur til at menna felags verkætlanir til frama fyri heilsuvísindaliga gransking, m.a. við atliti at tryggja granskingargrundaða undirvísing og menning á stovnunum.

Partarnir eru samdir um at samstarva breitt innan øll øki viðvíkjandi heilsuvísindaligari gransking. Harumframt eru partarnir samdir um í felag at leggja dent á at eyðmerkja og miðvíst styrkja og íverkseta gransking innan strategisk týdningarmikil økir, eitt nú økir av týdningi fyri

heilsuútbúgvingar í Føroyum, og økir økir við høgum heilsufakligum serkunnleika, tað breiða almenna sjúkuøkið og heilsutænastur í nærumhvørvinum.

Báðir partar hava sum mál støðugt at styrkja granskingargóðskuna og at lyfta førleikastøðið í heilsuvísindaligari gransking. Treytin fyri hesum er m.a., at karmarnir kring granskingina eru so góðir sum gjørligt og at partarnir megna at fáa og fasthalda dugnalig starvsfólk.

Granskingarsamstarvið er bundið at tí politikki, sum til eina og hvørja tíð er galdandi á Setrinum og í Sjúkrahúsverkinum, tá tað kemur til granskingarintegritet, granskingarfrælsi og ábyrgdarfulla granskingarsiðvenju.

## 6. Útbúgving og undirvísing

Leiðslusamstarvið fevnir um allar heilsuútbúgvingar, sum Setrið bjóðar. Partarnir fara at menna útboðið av útbúgvingum til framtíðarinnar útbúgvingar- og arbeiðsmarknað á heilsuøkinum í mun til tørvin í samfelagnum.

Útbúgvingarsamstarvið verður fevnt av leistinum hjá Setrinum um góðsku og menning av útbúgvingum í samsvari við bolognatilgongdina.

Partarnir skulu framhaldandi menna Sjúkrahúsverkið sum undirvísingar- og útbúgvingarstað, so Sjúkrahúsverkið framyvir verður uppaftur betur ført fyri at veita kliniska undirvísing í heilsufakum.

Leypandi menna partarnir førleikar, starvsfólkaorku og umsiting í sambandi við útbúgvingarnar.

Tá Sjúkrahúsverkið og Setrið skipa fyri innanhýsis skeiðum og undirvísing eigur at verða mett um, um, hvørt hesi eisini kunnu bjóðast hinum partinum. Ítøkiligu karmarnir verða avtalaðir frá ferð til ferð.

Sjúkrahúsverkið skal viðvirka til, at starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum, eftir nærri avtalu, kunnu virka sum undirvísarar á Setrinum. Sum liður í arbeiðinum fram ímóti einum Universitetssjúkrahúsi, skal ein skipan mennast, soleiðis at starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum kunnu undirvísa á Setrinum og umvent.

Harumframt verður arbeitt víðari við, at vísindafólk í starvi í Sjúkrahúsverkinum verða knýtt at Setrinum sum vísindafólk, ávikavist sum kliniskur adjunktur, lektari ella professari.

## 7. Ph.d. útbúgving

Ph.d. útbúgving skal skipast eftir ásetingum í galdandi ph.d. kunngerð og reglugerð.

Við atliti at nøkta eftirspurningin eftir ph.d.-lesandi og fyri at tryggja dygd og týdning í granskingarútbúgvingini, leggja báðir partar figgjargrundarlagið til rættis. Arbeitt verður fram ímóti, at internar puljur verða fingnar til vega til lutvísa fígging av ph.d.-verkætlanum.

Setrið og Sjúkrahúsverkið skulu stimbra ph.d.-verkætlanum innan heilsuvísindi á Setrinum. Fyri at menna Sjúkrahúsverkið og heilsugransking í Føroyum sum heild, eiga hesar ph.d.-verkætlanir, sum meginregla, at verða staðsettar í Føroyum og tann ph.d.-lesandi innskrivaður á Setrinum.

## 8. Vitanardeiling og -miðling

Setrið og Sjúkrahúsverkið samstarva um felags miðlastrategi. Tað er av týdningi, at báðir partar samstarva um at miðla granskingarúrslit soleiðis, at vitanin á henda hátt kemur borgaranum og samfelagnum til góðar.

Tað er avgerandi, at tann vitan, sum verður innsavnað og kemur fram í samstarvinum, verður miðlað bæði innanhýsis og uttanhýsis við felags eksponering.

Partarnir eru samdir um týdningin av sterkum og greiðum miðlaátøkum um granskingarúrslit og vilja í felag arbeiða fyri einari proaktivari og skipaðari tilgongd viðvíkjandi deiling og íverksetan av nýggjari vitan.

## 9. Ekstern fígging

Stórar útreiðslur eru av gransking og granskarar hava leypandi tørv á at fáa granskingarstuðul. Kappingin er hørð um uttanhýsis stuðul og umsøkjarar standa sterkari, um umsóknin byggir á eitt breitt og vælvirkandi samstarv millum fleiri partar. Miðað verður tí ímóti, at Sjúkrahúsverkið og Setrið hava eitt tætt samstarv um at fáa uttanhýsis fígging til vega.

## 10. Styrkja karmarnar kring heilsugransking

Fyri at menna heilsugransking í Føroyum, er neyðugt at styrkja fysisku karmarnar kring heilsugransking og menna undirstøðukervið.

Sjúkrahúsverkið og Setrið skulu støðugt arbeiða við at menna karmarnar kring heilsugransking.

Fyri at uppbyggja tær stuðulsfunktiónir, ið skulu til fyri at stimbra og stuðla undir heilsugransking í Sjúkrahúsverkinum, skulu Setrið og Sjúkrahúsverkið samstarva um felags stuðulsfunktiónir.

Setrið hevur fleiri starvsfólk í Eindini fyri Gransking og Framtak (Research- and Enterprise Unit - REU), ið m.a. arbeiðir við at fáa uttanhýsis fígging til granskingarverkætlanir. Partarnir eru samdir um, at hendan eindin skal styrkjast.

Sjúkrahúsverkið, herundir Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum, kann nýta starvsfólkini í granskingar- og framtakseindini á Setrinum til at stimbra og stuðla undir heilsugransking í Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið og Setrið skulu hvør sær tryggja, at starvsfólk, ið fáast við at veita tænastur til hin partin, hava neyðugar útbúgvingar og førleikar, eru skikkað og fáa regluliga dagført sína vitan, til tess at kunna veita tænastur á einum nøktandi stigi.

Sjúkrahúsverkið og Setrið gera eina greining av, hvør tørvurin er at uppraðfesta rannsóknarstovur í Sjúkrahúsverkinum, soleiðis at hesar kunnu virka sum granskingar-rannsóknarstovur.

Arbeitt verður fram ímóti at byggja eitt simuleringshøli til undirvísing í heilsufakum og til heilsugransking í Føroyum, íroknað menning av starvsfólkum í Sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahúsverkið og Setrið gera í felag eina greining av, hvør tørvurin er til innihald í simuleringshølið.

Harumframt verður arbeitt fram ímóti, at byggja eitt auditorium til undirvísing í Sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahúsverkið ger eina greining av, hvør tørvurin er á auditorium í Sjúkrahúsverkinum.

## 11. Dáta

Sjúkrahúsverkið og Setrið ynskja at samstarva innan gagnnýtslu av tøkniligari útgerð og KT-skipanum, til gagns fyri báðar partar. Ein neyvari lýsing av hesum økinum skal gerast, tá hendan avtala er sett í gildi.

Harafturat binda partarnir seg til at menna vegleiðingar í sambandi við dupultsetanir hjá granskarum og lesandi um umbýti av persóndáta at brúka til gransking í Sjúkrahúsverkinum og á Setrinum.

## 12. Tíðarskeið og uppsøgn

Henda avtalan kemur í gildi 1. juli 2024.

Samstundis fara úr gildi avtala um samstarv millum Fróðskaparsetur Føroya og Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu, dagfest 31. mars 2014 og avtala um samstarv millum Fróðskaparsetur Føroya og Landssjúkrahúsið, dagfest 31. mars 2014.

Partarnir kunnu, hvør sær, siga hesa avtaluna upp, við eini freist upp á 12 mánaðir.

Um annar parturin sigur avtaluna upp, halda, allar fíggjarligar avtalur, sum partarnir hava átikið sær í sambandi við avtaluna, tilknýttar avtalur og avtalur gjørdar áður, fram í fullum líki, til hesar eru gjørdar upp, sambært serstøkum avtalum og galdandi ásetingum annars.

Um partarnir semjast um at gera nýggja avtalu um samstarv, fer hendan avtalan úr gildi, tá ið nýggj avtala verður sett í gildi.

## 13. Undirskriving og heildin av avtaluni

Henda avtala verður undirskrivað í tveimum pørtum, eitt eintak til hvønn partin. Avtalan við tilhoyrandi fylgiskjølum lýsir treytirnar, ið eru avtalaðar millum partarnar og skulu møgulig ískoyti til avtaluna verða dagfest og undirskrivað í tveimum eintøkum av pørtunum, eitt eintak til hvønn partin.

Fróðskaparsetur Føroya, tann ... 26/6-24

Martin Tvede Zachariasen, rektari

Magni Mohr, dekanur á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarfrøðivísindi

Sjúkrahúsverkið, tann ... 26/6-24

Steinar Eirikstoft, forstjóri

Maria Skaalum Petersen, leiðari fyri Heilsugranskingareindina

# Fylgiskjøl

## Fylgiskjal 1. Strategi fyri heilsugransking

Heilsugranskingareindin innan Sjúkrahúsverkið og Deildin fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi samstarva um at gera eina strategi fyri framtíðar heilsugransking í Føroyum.

Partarnir eru samdir um, at í hesi strategi skal heilsugranskingin taka støðið í klinikkini og stuðla undir teimum heilsuvísindaligu útbúgvingunum. Tað er umráðandi at strategiin er rættað ímóti føroyska samfelagnum og harvið kemur sjúklinginum og føroyska fólkinum til góðar.

Miðað verður ímóti at fara undir hetta arbeiði á heysti 2024 og at arbeiðið verður liðugt á heysti 2025.

## Fylgiskjal 2. Læknavísindalig grundútbúgving í Føroyum

Í 2016 var álit um bachelorútbúgving í læknavísindum á Fróðskaparsetri Føroya handað. Í hesum áliti varð mælt til, at læknaútbúgving verður sett á stovn. Álitið er ikki sett í verk.

Í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn frá desember 2022, verður ásett, at tað skal vera møguligt at taka partar av læknaútbúgvingini í Føroyum. Harumframt verður í áliti um universitetssjúkrahús, frá september 2023, mælt til at dagføra álit um bachelorútbúgving í læknavísindum. Landsstýrisfólkini í heilsumálum og barna- og útbúgvingarmálum hava, í apríl 2024, undirskrivað semjuskjal, har tey eru samd um, at tilmælini í áliti um universitetssjúkrahús, sum viðvíkja bæði heilsumálum og barna- og útbúgvingarmálum, skulu setast í verk. Politisk undirtøka er tí fyri at fara undir arbeiðið at fyrireika eina útbúgving í læknavísindum í Føroyum.

Setrið og Sjúkrahúsverkið eru samd um at dagføra álitið um útbúgving í læknavísindum, herundir gera nýggja meting av, hvørt byrjað eigur at verða við postgraduate útbúgvingum ella bachelorútbúgvingum. Síðani eigur støða at verða tikin til, um ein læknaútbúgving skal setast á stovn á Setrinum.

Miðað verður ímóti at fara undir hetta arbeiði á heysti 2024 og at arbeiðið verður liðugt á heysti 2025.

## Fylgiskjal 3. APN-útbúgving

Samfelagsliga bendir alt á, at tørvur nú er á, at leggja seg eftir at bjóða masterútbúgving út, sum rættar seg eftir kliniskari sjúkrarøkt. Her kann m.a. verða talan um ‘advanced practice nurse’ (APN), sum er ein útbúgving, ið gevur sjúkrarøktarfrøðinginum førleikar til at arbeiða meiri sjálvstøðugt innan ávís økir. APN er ein møguleiki, men í Íslandi hava tey eina aðra skipan við kliniskum sjúkrarøktarserfrøðingum (Clinical Nursing Specialists). Hesi fáa eina masterútbúgving við

spesiali/sergrein innan ávís økir. Munurin millum hesar báðar útbúgvingar er ikki stórur og tað verður mett, at vit í Føroyum kundu gjørt eina, sum tekur støði í báðum.

Setrið og Sjúkrahúsverkið eru samd um, at tað er til frama fyri báðar partar, at arbeiða fyri at seta á stovn eina APN-útbúgving á Setrinum.

Setrið fer í næstum undir arbeiðið at seta á stovn eina APN-útbúgving á Setrinum.

Miðað verður ímóti at fara undir hetta arbeiðið á heysti 2024. Setrið metir, at tað tekur umleið 3-4 ár til at útbúgvingin í APN kann byrja.

## Fylgiskjal 4. Aðrar heilsuútbúgvingar

Umframt at dagføra álit um útbúgving í læknavísindi, eru Setrið og Sjúkrahúsverkið samd um at gera eina greining av, hvør tørvur er á heilsufakligum útbúgvingum annars í Føroyum.

Hetta var eisini eitt av tilmælunum í áliti um universitetssjúkrahús frá september 2023, sum landsstýrisfólkini í heilsumálum og barna- og útbúgvingarmálum eru samd um, skulu setast í verk, sambært semjuskjal frá apríl 2024.

Miðað verður ímóti at gera eina greining av, hvør tørvur er á heilsufakligum útbúgvingum annars í Føroyum, tá ið arbeiðið at dagføra álit um útbúgving í læknavísindi er liðugt.